## SAS skal aftur spara

Tað gongur framvegis ikki nóg væl hjá skandinaviska flogfelagnum SAS, og tí noyðist felagið at spara tvær milliardir svenskar krónur afturat í rakstrinum. Tað kom fram, tá felagið legði roknskapin fyri 2009 fram í Stockholm í morgun. Har sást, at SAS hevði næstan tríggjar milliardir svenskar krónur í halli í fjør, og tað úrslitið var munandi verri, enn greinarar høvdu væntað. SAS fekk í fjør seks milliardir svbenskar krónur í nýggjum kapitali við at selja partabrøv, og leiðslan sigur, at felagnum tørvar fimm milliardir svenskar krónur afturat í hesum árinum.




## Norðurkorea nærkast

Okkurt bendir á, at Norðurkorea er farið at nærkast teimum, sum vilja hava landið til samráðingarborðið at viðgera tess kjarnorkuverkætlan. Í síðstu viku var ein týðandi kinesiskur embætismaður í Norðurkorea og tosaði við leiðaran, Kim Jong-il, og nú hevur norðurkoreanska stýrið sent sín samráðingarleiðara til Beijing. Eygleiðarar siga við Reuters, at fundarvirksemið er helst eitt tekin um, at tann norðurkoreanska leiðslan fyrireikar seg til at taka samráðingarnar um kjarnorkuverkætlanina uppaftur. Tær slitnaðu fyri einum ári síðani.

# Gávugóðs til djarva listakvinnu

**60.000 krónur í gávugóðsi vórðu í gjár latnar ungu listakvinnuni Herborg Silju Strøm fyri hennara sermerkta dirvið at vera øðrvísi og hegnið til áhaldandi at útbúgva seg víðari**



*Tað var ein løtt avgerð at lata Silju Strøm gávugóðsið í ár, staðfesti Jóan Pauli Joensen, sum her handar ungu listakvinnuni stóra kjekkin*

MENTAN

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tað var ikki serliga torført hjá nevndini at gera av, at unga listakvinnan Herborg Silja Strøm skuldi hava Gávugóðsið úr Grunni Torvald Poulsens av Steinum í ár, staðfesti nevndarlimurin Jóan Pauli Joensen á samkomu á Fróðskaparsetrinum í gjár.

### Dýrt at vera listafólk

Sjálv helt Silja Strøm tað vera ein stóran heiður at fáa eina so stóra gávu heimafrá, tá man sum hon er lesandi og búsitandi uttanlands.

Hinvegin kom peningurin væl við, tí tað krevur ofta nógv at virka sum altjóða listafólk í dag, vísti hon á

- Sum listafólk í dag kanst tú ikki bara sita fyri teg sjálva og arbeiða. Skalt tú gera vart við teg í altjóða listaumhvørvinum, hevur tað sera stóran týdning, at tú sjálv eisini tekur stig til framsýningar, og ferðast og gert kanningararbeiði sum lið í grundgevingunum fyri tínum arbeiði.

Hetta ger seg ikki minst galdandi, um tú arbeiðir innan post-modernað rák, har alt fyrst verður brotið niður og onki er so einfalt longur, sum tað hevur verið, greiddi Silja Strøm frá.

- Man kann ikki bara vera listamálarin longur. Man skal allatíðina grundgeva fyri, hví man ger, sum man ger og fylgja væl í listarligum rákum, um tín list skal fáa nakran týdning.

Alt hetta arbeiði runt um sjálva listina kostar sjálvandi pengar, og tí kom Gávugóðsið sera væl við, segði Silja Strøm.

### Øðrvísi listakvinna

Gávugóðsið úr Grunni Torvald Poulsens av Steinum verður sambært viðtøkum grunsins uttan umsókn givið einum ungum listafólki, sum hevur víst hegni og hug at útbúgva seg.

Gávugóðsið, sum er 60.000 kr., varð latið Silju við hesi grundgeving:

Silja Strøm (f. 16. januar 1987) hevur við evnaríkum tekningum luttikið á Ólavsøkuframsýning, og í 2008 hevði hon framsýning í Smiðjuni í Lítluvík, har umhvarvið av einum komandi listafólki av álvara hómaðist.

Í 2007 byrjaði Silja hægri listarliga útbúgving á The Glasgow School of Art, og seinasta heyst var hon so heppin at sleppa at vera gestalesandi á Akademie der bildenden Künste í Wien. Hon hevur eisini luttikið á fleiri framsýningum á høgum støði. Serframsýning hennara “we will sink and settle on the waves” var í Mentamálaráðnum í 2009.

Í úrvalsframsýningini “Myndaódnin” á Steinprenti um jólini hingu tvær sera áhugaverdar prentmyndir hennara ímillum myndir hjá Per Kirkeby og Marius Olsen. Silja er ung og undir útbúgving, og tað sæst longu, at listagávur hennara eru sjáldsama væl paraðar við skynsemi og áræði og einum gjøllhugsaðum, varisligum og tálmaðum yvirbrá, sum gevur ábendingar um ein sermerktan fínleika, samstundis sum listakvinnan í øðrum myndum veruliga torir at vera ljót og øðrvísi í sínum lýsingum.

Í nevndini fyri grunnin sita Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag, Oddfríður M. Rasmussen, formaður í Listasambandi Føroya og Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetri Føroya

### Spøkilisi úr fortíðini

Listaframsýningin hjá Silju Strøm »We may sink and settle on the waves«, sum var at síggja í Mentamálaráðnum vakti rættiliga stóran ans, og fekk sera góð ummæli.

Talan var um eina sera øðrvísi framsýningi, ið millum annað var lýst í eini samanbering við sanskrit orðið Palimpsest, ið merkir at endurnýta papýrus rullur soleiðis, at tað, ið stóð skrivað og teknað áðrenn, sæst ígjøgnum tað, ið av nýggjum er skrivað ella teknað á somu rullu.

Somuleiðis kann sigast, at myndirnar hjá Silju Strøm m.a. viðgera tíð og bókmentir, spøkilsi úr ókendari tíð ganga aftur ella hava kanska ikki verið enn. Komandi og farandi likamslutir og støð, sum tey hómast á pappíri millum máling og linolju.

Á framsýningini vóru fotolitografisk prent, tekningar, collage eins og smáir málningar at síggja. Eitt slag av nostalgiskum savni av gomlum fotomyndum og síðum úr gomlum bókum, sum Silja hevði teknað og málað á og klipt burturúr.

Unga listakvinnan greiðir frá, at hesi verkini snúgva seg um at varðveita minstamarkið av sambondum, ið staðfesta eyðkenni, ið eru neyðug fyri, at ein kann kenna tey aftur. Ósamanhangandi og sundurlimað brot fáa ein at hugsa um kúgaðar ella goymdar kenslur og ynski, og í myndlistini verður tað víst, eins og modernistisku rithøvundarnir ofta gjørdu í teirra umtalu av havinum.